## VIÐMERKINGAR

# Landsstýrið ætlar at senda rokningina til tey lágløntu og veiku



**Finnleif Guttesen**

Undanfarna landsstýrið ætlaði, at kommunurnar skuldu yvirtaka og gjalda barnaverndar- og eldraøki, ongantíð ov skjótt. Núverandi landsstýrið ætlar tað sama, men kanska ikki við sama øði sum fráfarna landsstýrið. At Javnara og Sambandsflokkurin taka undir við hesum er í andsøgn við teirra sosialpolitikk, men eg fari kanska skeivur?

**Rakar tey lágløntu og veiku meinast**

Barnaverndarøkið skal nútímansgerast og ein eykarokning uppá 16 milliónir blívur send kommununum 1. januar 2005 og øll vita, at hetta tal fer at økjast komandi árini.

Hervið tvingar landsstýrið kommunurnar til at hækka skattaprosenti og rakar hetta mest tey lágløntu og veiku. Tí hesi fólk gjalda lítlan landsskatt, men fullan kommunuskatt, og hækkar kommunuskatturin, ja, so merkja tey lágløntu og veiku tað meinast.

**Ein landsuppgáva**

Barnaverndarøkið er ein landsuppgáva, tí tá er møguleikin minstur fyri, at mál verða viðgjørd ymiskt.

# Einskiljingarlisti

**Zakarias Wang**

Nógv bendir á, at tað verður neyðugt at gera ein uttanflokka lista til býráðsvaldið í Tórshavnar kommunu, ið hevur til endamáls at einskilja ta almennu jørðina.

Spurningurin er nevnliga, hvussu leingi vit skulu finna okkum í at lata teir politisku flokkarnir spæla sær við jørðina til størsta skaða fyri okkum øll.

Fyri at skilja hvussu ótrúligt tað er, sum fer fram, er kanska gagnligt at líta at, hvussu ber tað til, at ognarviðurskiftini til jørðina í Føroyum eru sum tey eru blivin.

**Føroyar eins og Amerika**

Í fyrstuni vóru Føroyar eins og Amerika. Eitt óbygt land, sum fólk settust í.

Her fóru kvinnur og menn til verka. Settust á berar steinar, men góvust ikki á hendur! Bygdu tak yvir høvdið og arbeiddu, so tey fingu bæði at bíta og brenna.

**Óðalsjørð**

Men hvør átti hetta land?

Áðrenn nakar setti búgv her, ber til at siga, at hesar oyggjar vóru felags ogn hjá allari mannaættini. Tá fólk settust her, samtyktu tey sínámillum, hvør ið átti hvat.

Tey gjørdu tí landið til sín óðal. Í hesum orði liggur tann áseting, at jørðin var ogn hjá tí ætt, sum hevði sett seg fyrst á hana og arbeitt hana.

Ognarrætturin til jørðina stavar frá tí rætti, sum hvør menniska hevur til at eiga seg sjálva. Hetta er tann grundleggjandi mannarætturin, sum øll hava, og tá ið tey nýta sína arbeiðsmegi til at byggja hús á jørð, sum er felags ogn hjá mannaættini, fáa tey rætt til at eiga jørðina, av tí at tey broyta hana við at leggja ein part av sær sjálvum, nevnliga sína arbeiðsmegi, í jørðina. Men hetta ger eingin einsamallur. Ættin var felags um hetta stóra tak, og tí var hugsunarhátturin, at tann sum átti jørðina bert var umboðsmaður fyri ættina. Hann hevði arvað jørðina frá sínum fedrum, og tá hann ikki var longur, so skuldi onkur annar í ættini halda fram.

**Aðalsjørð**

Men so við og við vaks hugsanin um, at tað skuldi bera til at lata jørð burtur úr ættini. Hetta vildi ikki siga, at jørðin helt uppat at vera óðalsjørð. Óðalsrætturin var nú hjá eigarnum, og eins og hann hevði havt fólk til at arbeiða fyri seg á garðinum, so fekk hann, tá talan var um uttanbíggjarjørð, onkran sum búði í tí bygd, jørðin var í, til at arbeiða hana. Nú siga vit at talan er um uppsitarar, men í tí Føroyingasøgu, sum skrivað er í Íslandi um 1215, verður sagt at nøkur hundrað ár eftir landnámið hevði Tróndur í Gøtu leigulendingar. Hann sum hevði óðalsrættin til jørðina royndi sjálvsagt eins og Tróndur at fáa sum mest av landskuld burturúr jørðini, men var hann ov kravmikil, so var eingin sum vildi arbeiða hana, og so fekk hann einki!

Tað vóru ikki bert føroyingar, sum fingu uttanbíggjarjørð, men eisini norskar aðalsættir. So seint sum fyri góðum tvey hundrað árum síðani var t.d. jørðin í Sørvági aðalsjørð. Har høvdu teir norsku aðalsmenninir óðalsrættin. Síðan seldu teir jørðina til føroyingar, og óðalsrætturin er nú hjá teimum, sum hava útvegað sær hana.

**Pávi og kongur**

Men størsti óðalseigarin í Føroyum gjørdist tó kirkjan. Tá trúbótin kom í 1537, var størsti eigarin í Føroyum pávin í Rómaborg! Ikki mundi tað tó vera nógv landskuld, sum kom fram til Pæturs stól, tí meginparturin av henni varð nýtt til kirkjuna her. Jørðin varð býtt sundur í rættiliga stórar garðar, sum leigulendingar arbeiddu.

Trúbótin bar við sær, at vit fingu ein nýggjan óðalsmann í Føroyum, tí norski kongur okkara tók jørðina frá kirkjuni. Men skipanin við leigulendingum helt fram. Nú fór landskuldin tó ikki til kirkjuna í Føroyum, men til kongsins húsarhald, har tað so var.

Tá var hetta hildin vera ein góð skipan, tí illa gekst hjá kongum at fáa inn skatt, og við at eiga jørðina kundu teir leggja tyngri byrðar á leigulendingarnar enn á nakran annan samfelagsbólk. Skjótt komu stjórnmálamenn tó eftir, at hetta var ein óheppin skattaskipan, og í seytjandu øld byrjaðu sviar at ganga nýggjar leiðir og einskildu jørðina.

Hetta var ein partur av tí umskiping, sum førdi við sær at Svøríki vann á Noreg/Danmark og tók stórar og virðismiklar partar av hesum ríkjum. Hjá norðmonnum og dønum var tí einki annað at gera, um teir skuldu standa seg í kappingini, at ganga somu leið og einskilja kongsins jørð, og hetta varð gjørt.

**Arvurin frá gablunum**

Men tá vóru Føroyar komnar í klørnar á gablunum,



sum fingu alla landskuld av oyggjunum, Teir vildu ikki sleppa hesi inntøku og tískil fór eingin einskiljing fram í Føroyum. Tá gablarnir fóru í søguna, tóku kongsins embætismenn við eftir teir. Fyri teir var tað ógvuliga høgligt at ráða yvir jørðini, tí tað gav teimum nógv meir vald enn teir annars høvdu havt.

Tá vit fyri hálvtannaðhundrað árum síðani fingu fólkaræði í Danmark, kravdu teir fáu kongsleigulendingar, sum har vóru eftir, at teir beinan vegin skuldu fáa jørðina til keyps. Hetta varð sett í verk. Men í Føroyum hendi einki. Her helt gablatíðin fram!

**Eingin demokratisering av ognarrættinum**

Beint við gøtuna inn til Havnar kirkju stendur ein gravsteinur. Á honum verður sagt, at har er í 1857 grivin ein kongsleigulendingur í Hoyvík, og at 10 børn syrgja hann. Hevði kongsins jørð í Føroyum verið einskild samstundis sum hon varð tað í Danmark, so høvdu teir 850 eftirkomararnir hjá hesum leigulendingi nú átt ein part av hesum garði, sum hevði verið um 6500 fermetrar. Sama hevði gongdin verið øllum øðrum kongsleigulendingaættum viðvíkjandi.

Eina slíka demokratisering av ognarrættinum fingu vit ikki, tí umboðsmenn óðalseigarans, embætismenninir, sýtti fyri hesum. Í staðin varð tvíhildið um, at bert ein av arvingunum skuldi taka við leigumálinum.

Síðstu tvey hundrað árini er fólkatalið vaksið nógv. Í teimum bygdum, har fólkini sjálvi áttu óðalsjørðina var hetta einki vandamál, tí jørðin varð býtt enn meir sundur enn fyrr, so talið av húskjum kundi vaksa. Men har leigulendingar sótu við jørðini, sýtti eigarin, tað almenna, fyri at býta so nógv sundur millum arvingarnar, sum gjørt hevði verið, um fólk sjálv áttu jørðina.

**Garðsleigulendingar og traðarleigulendingar**

Fyri at bøta eitt sindur um henda mismun móti systkjunum hjá leigulendingunum - og øðrum sum høvdu tørv á jørð fyri at seta búgv - varð ein skipan við leigutraðum fingin í lag. Embætismenn fingu enn ein bólk av leigulendingum at ráða yvir, og hesir nýggju fingu ikki somu treytir sum teir fyrru. Sjálvt orðið leigulendingur varð tikið úr málinum, og garðsleigulendingarnar vórðu kallaðir kongsbøndur fyri líkasum at vera eitt sindur fínari enn hinir, sum itu traðarmenn. Fyri at fáa uppaftur meir split í varð ásett, at traðarmenn sluppu at arbeiða jørðina, men ikki at ráða yvir henni um veturin, tí jarðareigarin segði, at upprunaligi leigulendingurin skuldi hava rætt til vetrarbit.

Skjótt fingu traðarleigulendingar ein fyrimun fram um garðsleigulendingar, tí teir sluppu at keypa jørðina. Henda rætt fingu teir við at velta hana, men uttan mun til hvussu nógv teir garosleigulendingarnir veltu, so fingu teir ikki loyvi til at keypa nakran snøkil.

**Óðalsrætturin afturvunnin – partvíst**

Men við hesi áseting kom ein partur av tí óðalsrætti, sum hevði verið hjá embætismonnunum, aftur á hendur fólksins. Henda einskiljing av jørðini hevur havt heilt ómetaligan týdning fyri framburðin í landi okkara, tí harvið sleppa fólk sjálvi at gera av, hvat ið jørðin skal verða nýtt til.

Eitt er tað, at tað ber til at nýta hana til tað vit vanliga kalla jarðarbrúk. Men eingin jørð hevur givið meir av sær enn tann, sum verður nýtt til at seta hús á. Hetta hevur verið galdandi síðan landnámstíð, og nú tjóð okkara er vaksin so nógv, er hesin eftirspurningurin øktur munandi. Tí eru tað alt fleiri traðarmenn, ið halda tað loysa seg at nýta jørðina til bygging, og hevur hetta gjørt, at vit hava fingið meir burtur úr jørðini enn frammanundan.

**Eingin veðmøguleiki**

Tað eru tó ikki allir traðarmenn, ið hava verið so hepnir, at teir hava fingið ræði á síni egnu jørð. Summir eru framvegis leigulendingar, og kunnu ikki ráða yvir tí jørð teir arbeiða. Teir eru í so máta í somu støðu sum garðsleigulendingarnir.

Felags fyri hesar báðar bólkar er, at av tí at teir ikki eiga jørðina, so kunnu teir ikki seta hana í veð fyri lán. Hetta forðar fyri, at menn kunnu reisa kapital, sum teir kunnu nýta sum trygd fyri nýggjum fyritøkum.

Hetta ber hin vegin til hjá teimum, sum hava fingið traðir ella grundstykki til keyps. Tíverri hevur tað almenna ofta lagt tungar treytir við tá ið traðirnar eru seldar. Ein traðarmaður í Havn kann koma út fyri, at vegur verður gjørdur á trøð hansara uttan at hann fær endurgjald, og tað ger at virði á trøðni er minni enn tað annars hevði verið, og at kapitalur er lítil, sum kann reisast við veð í henni.

**Framstig eru tó hend**

Tann sum stendur uppi við Hotel Føroyar og hyggur út yvir Havnina, sær ein heilan bý, sum er bygdur á einskildari jørð, sum hevur stórt virði, og kann vera rekmátturin í framburði í landi okkara.

Men samstundis eru stór øki, sum ikki eru í somu hepnu støðu, og sum høvdu kunnað latið upp fyri ótaldum møguleikum um tey vórðu einskild so sum byrjað var uppá í Svøríki, Noreg og Danmark fyri fýra hundrað árum síðani.

**Politisku flokkarnir forða fyri skilaráðum**

Nú hava vit havt løgting og kommunur í smáar tvær øldir, men hvussu ber tað til at hesir stovnar ikki hava megnað at einskilt jørðina?

Hetta er ein spurningur um politikk. Fyri at koma nakra leið mugu vit hava politikarar, sum vita hvat teir vilja, og prioritera loysn av hesum máli fram um annað, teir kunnu nýta sína tíð til.

Hetta hava vit ikki sæð nógv til.

Fara vit á fund hjá teimum politisku flokkunum, so vísir tað seg, at í øllum teirra eru fólk, sum halda hetta vera eitt týdningarmikið mál at loysa. Men samstundis eru í øllum flokkum fólk, sum siga seg venda flokkinum bakið, um so er at hann ger nakað sum helst við einskiljing av jørðini. Úrslitið er, at einki hendir.

**Hvat er at gera?**

Ein gongd leið hevði verið at tey, sum halda at hetta mál er umráðandi at fáa loyst, taka seg saman um at gera eina fylking, ið hevur til endamáls at fáa gongd á í hesum máli.

**Nær er rætta høvið at byrja?**

Í veruleikanum er mótstøðan størst í kommununum. Manga staðni eru politiskir flokkar í kommunustýrunum, og frá teimum kemur einki. Skal nakað broytast, er tí helst neyðugt hjá teimum, sum vilja broytingar, at stilla upp til kommunuval.

Størst er mótstøðan móti einskiljing í Tórshavnar kommunu. Her er tí eisini mest at vinna við einum politiskum tiltaki, sum hevur til endamáls at leigulendingar gerast óðalsmenn, sum allir eru undir somu lógarreglum sum verandi óðalsmenn.

Man rætta løtan til eitt slíkt tiltak ikki vera beint nú?



## VIÐMERKINGAR

# Bústaðarviðurskifti í Tórshavnar kommunu

TÍÐINDASKRIV

*frá Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag*

Komandi býráð í Havn eigur at seta sær sum mál, at nøkta allan íbúðartørv í kommununi. Serliga eigur býráðið at raðfesta ungdóms-, eldra- og brekaðvinarligar íbúðarloysnir.

Hetta var ein av niðurstøðunum á einum almennum fundi um bústaðarviðurskifti í Tórshavnar kommunu, sum Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag skipaði fyri á Landsbókasavninum 15. september í ár. Á fundinum luttóku m.a. Lív Tórgarð fyri Føroya Ungdómsráð, Bjarni Wilhelm fyri Sjálvsognarstovnin Berjabrekka , Svenning og Amy Tausen umboðandi eldra ættarliðið, Jógvan Mørkøre fyrrverandi formaður í Føroya Kommunufelag, Sigrun Mohr fyri Alzheimerfelagið og Bent Jákup Hansen sum umboð fyri leigunevndina í Tórshavnar Kommunu.

**Útstykking**

Á fundinum kom fram, at tørvur er á bústaðartilboðum til fólk í øllum aldri. At kalla einasti møguleiki at seta búgv í kommununi er at byggja sær hús og her eru serliga grundstykkini - prísirnir og útboðið - ein trupulleiki. Av tí at eftirspurningurin eftir grundstykkjum í kommununi er so stórur og útboðið samstundis lutfalsliga lítið verður príslegan fyri grundstykkir í privatum handli øgiliga høg. Her helt fundurin eina loysn vera, at kommunan legði doyin á at útstykkja til privata bygging. Um útboðið av kommunalum grundstykkjum nærkaðist eftirspurninginum hevði privati grundstykkjaprísurin eisini falli. Tilsamans hevði talan verið um munandi betraðar møguleikar hjá privatfólki at bygt sær hús fyri ein rímuligari penga enn nú.

**Sosial- og alternativ íbúðarbygging**

Men bíligari grundstykki er ikki einasta loysnin sum fundurin vísti á. Kommunan eigur at raðfesta nógv hægri enn nú, at byggja ella keypa íbúðir til heim hjá serliga tørvandi, vardar íbúðir, sambýlir, ellis-, og umlættingarheim og næmingaheim til tey lesandi. Eisini helt fundurin, at skilagott hevði verið um kommunan tók á seg ein virknan leiklut í sambandi við sosiala íbúðarbygging. Sum dømi um at kommunan longu í ávísan mun hevur arbeitt við hesum er Sjálvsognarstovnurin á Berjabrekku, sum ætlandi skal fevna um góðar 60 íbúðir til ein samansettan skara av leigarum.

**Tey eldru vísa sjálvi á eina gongda leið**

Amy og Svenning Tausen greiddu frá hvussu tey hava loyst ein vanligan íbúðartrupulleika á ein sera áhugaverdan hátt. Nógv eldri sita í alt ov stórum og rakstrartungum húsum, men hava einki annað í at velja. Samstundis hava nógv ung stóran tørv á íbúðum. Ami og Svenning greiddu frá hvussu eitt av børnum teirra keypti húsini hjá forldrunum, sum síðani leigaðu aðru hæddini í húsinum. Tey eldru hava skeyti uppá at tey hava lívslangan leigurætt til íbúðina. Amy og Svenning Tausen søgdu at tey ikki høvdu uppliva nakran vansa, men nógvar fyrimunir, við hesari skipan. Hetta er eitt dømi um hvussu fólk sjálvi, við nýhugsan, kunnu loysa hendan vanliga trupuleikan. Uttan iva kunnu nógvar aðrar familjur nýta hendan mátan. Men so eru eisini nógv onnur sum ikki hava hendan møguleikan og tí má samfelagið skipa fyri betraðum karmum á íbúðarøkinum.

**Skipaðan leigumarknað**

Eitt triðja sum koma fram á fundinum var tørvurin á at fáa skipaði viðurskifti á leigumarknaðinum. Leigumarknaðurin er í ovurstóran mun merktur av, at eftirspurningurin eftir býli er nógv størri enn útboðið. Hetta hevur við sær, í nógvum førum, at fólk mugu gjalda eina ógvuliga høga leigu fyri smáar og illa hildnar íbúðir ella kømur. Í nógvum førum er talan um beinleiðis óvirðiligar umstøður, tá fólk eitt nú gjalda 2-3000 krónur fyri eitt kamar, har tey mugu deilast um wc og bað við aðrar leigarar, ella kanska eigaran, og har tey ikki hava atgongd til køk ella umstøður til at vaska klæðir.Henda støðan er óforsvarlig, og botnar fyri ein stóran part í væntandi lóggávu á økinum. Hetta kann býráðið sjálvandi lítið gera við. Men eitt, sum býráðið kann gera nakað við, er at minkað um munin ímillum eftirspurning og útboð á bústaðarmarknaðinum. Hetta kann býráðið gera við at stimbra íbúðarbygging í kommununi, og soleiðis minkað eftirspurningin eftir bústaðum so mikið, at leiguprísirnir funnu eina rímuliga legu.

# Tá seyður skal drepast, skal hann skjótast

**Djóraverndarfelagið**

Leygardagin 9. oktober ringdi fólk og boðaðu frá, at menn vóru farnir á fjall, og meiningin var at stinga seyðin í staðin fyri at skjóta hann. Vit bóðu viðkomandi ringja til landsdjóralæknan. Viðkomandi ringdi aftur og segði, at djóralæknin segði, at tað var forboðið at stinga, tí tað var at pína seyðin. Tað er bert loyvt at skjóta seyðin. Hann segði, at viðkomandi kundi ringja til løgregluna og boða frá.

Seyður er í veruleikanum ógvuliga "menniskjansligur", jf. grein um Seyð og strongd hjá John D. Olsen í Dimmu leygardagin 9. oktober 2004. Seyður kennir andlit aftur, 10 fólkaandlit og 50 seyðaandlit í upp til 2 ár, og hann følir seg ikki einsamallan, um hann hevur eina mynd av einum øðrum seyði framman fyri sær. Tá ið øll nú vita hetta, so er tað ein beistager av teimum ringastu at lata seyðin, sum bíðar eftir at blíva dripin (skotin altso) síggja høvdini á tí seyði, sum longu er avhøvdaður. Vónandi syrgja menn fyri at hetta ikki hendir.

P.S. Tað er heldur ikki loyvt at hava seyðin liggjandi niðurbundnan.

# Ringt skil

**Anfinn Laksáfoss**

Búskaparliga gongdin hjá fiskivinnutjóðini Føroyar er tann skeiva vegin, tann náttúrliga vegin, kunnu vit eisini siga. Fíggjarstøðan hjá landskassanum, er tengd av góðum og vánaligum fiskiárum. Hettar mugu vit føroyingar ásanna, at hetta er so, uttan mun til politiskar avgerðir. Eitt annað er so, hvussu farið verður fram í landsins leiðslu, í mun til gongdina í fiskivinnuni. Hvussu nógv verður lagt til síðis og brúkt í góðum tíðum o.s.f.

Eg kundi hugsa mær at vita, um tað yvirhøvur vera tikin atlit til gongdina í fiskivinnuni, tá ið lønarsamráðingar eru á tí almenna og privata sektorinum? Tá ið búskaparliga kreppan í fyrru helvt av nítiárinum vendi, av tí at fiskurin kom at vitja klettarnar aftur, var nógv argumenterað við, at nú máttu tær almennu og privatu lønirnar hækka, so at tey eisini fingu sín part av tí avkasti, sum havið nú var komið við. Aftaná niðurgongdina í fiskivinnuni seinastu tvey árini er føroyski fiskimaðurin farin niður í løn við eini 30 prosentum, onkrir bólkar heili 50 prosent. Kanska kundi hettar eisini verið tikið við til lønarsamráðingar næstu ferð?

Argumenterað hevur eisini verið við, at almennu og privatu lønirnar skullu vera á sama støði, sum í øðrum norðurlondum, sum tey eisini væl hava fingið uppfylgt. Skullu føroysku fiskimennirnir vera á sama støði sum í hinum norðurlondunum, skal ein stórur skattalætti koma afturat skattalættanum til sjófólkið, sum ið løtuni er virkin. Samstundis sum lønarhækkingar fara fram, hava røddir verið frammi um at lækka inntøkuloftið fyri skattalættan, samsýningingina, ið fiskimaðurin fær fyri tað hann bløðir, fyri tað føroyska samfelagið, á sjónum. Skattalættin til sjófólkið, er eitt tað stórsta framstigið, í føroyskum politikki, í nðggjari tíð.

Sjálvandi skulla tær almennu lønarhækkingirnar, ikki ganga útyvir landskassan, fólksins bankabók, sum jú er tengdur av gongdini í fiskivinnuni. Her muga sparingar og automatiseringar til, í mun til at tænastustøði eisini kann gerast betri. Sjálvur kostnaðurin av tí almenna hevur ongantíð verið so stórar fyrr, heldur ikki í mun til inntøkur landskassans. Kanska kundi hesar lønarhækkingar heldur verið spardar, so ymisk avgjøld kundu verið avtikin, og skattaprosentið lækka. Kostnaðarstøði kundi lækka, so allir borgarar í landinum høvdu fingið ein ágóða av tí.

Støðugt vaksandi lønir á tí almenna og privata marknaðinum, kann ongantíð vera nøkur góð loysn, tá ið vit hava eina óstøðuga fiskivinnu, og harvið ein óstøðugan búskap.

Síðstu tíðina hava arbeiðarafeløgini víst seg, at vera meira til ampa fyri limir sínar, enn hjálp. Arbeiðarafeløgini hava hingið í lúnningini á virkjum, og roynt at kollsilgt tey. Limir teirra síggja, meðan beinini vera háladi undan teirra arbeiðsplássum.

Arbeiðarafeløgini hava, so at siga, roynt at kvalt hvørt eitt tað einasta flakavirkið í landinum, við arbeiðssteðgum og methøgum tímalønum. Úrslitið er, at virkini ikki longur hava kunnað verið kappingarfør í prísi, og nógvur fiskur er tískil farin óvirkaður av landinum.

Nú hava arbeiðarafeløgini heitt á landsstðrið, um at avmarka stóra útflutningin av rundum fiski, beinleiðis á útlenskar marknaðir. Sjálvandi skal so nógvur fiskur sum møguligt, virkast liðugur á føroyskum virkjum, men hetta sigur nakað um hvussu lágt støðið er á arbeiðarafeløgunum. Her má eitt ella annað, gerast fyri, at arbeiðarafeløgini ikki sleppa at veipa við ørmunum soleiðis.

Náttúrligt er jú, at hvør roynir at fáa sum mest burtur úr, har sum man er, men eitt betri samanspæl má vera ímillum teir ymisku sektorarnar í landinum, tá ið vit bara hava eina høvuðsvinnu, fiskivinnu.

Minnist eg rætt, so var eitt tað størsta hjartamálið hjá sitandi samgongu, at røkka út til tann veikasta í landinum, Vóni at tað eydnast!

# EIN RULKUR

Kann eg virða náttargalan nóg nógv, og
ikki bara kveistra hansara song burtur, og
meta hann ófullkomnan sangara?

Dagurin kemur nú, og sólin
rísur so fjálg og góð
eftir so drúgva, ríka og
klára nátt - sum náttin var
klár, hugsi eg - omaná. Tí
undir lá okkurt og bøldi - ein
rulkur. Hví lá hann har og bøldi?

Sera torført er at greina hetta mál -
endaleyst tykist tað;
bara eg hevði dugað -
o, lást tú bert og bíðaði hettar,
rulkur?
Aha! Nú veit eg:
barst tú meg ikki
so trygt
inn til
náttargalasangin o
trøll?

**Agnar Jógvansson**